# Jógvan á Trøllanesi 70 ár



*Her er Jógvan í essinum. Í 2005 hevði ættin vitjan av langabbasoni hjá Jóhannes av Nesi, sum var farin úr Føroyum til Bretlands 134 ár frammanundan. Jóhannes var langabbabeiggi okkum báðar, og eru vit allir fermenningar. Jógvan var tá innlagdur á sjúkrahúsi, men her eru Bill Johnson (avleitt av Joensen) og kona hansara Pam komin at siga Jógvani farvæl. Hendan vitjan var ein stórhending í ættini.*
*Eitt sindur av ættarsøgu av Trøllanesi kann lesast á heimasíðuni: www.fiskimannafelag.fo. blað nr. 348 og 373.*

Tann 21. mars verður Jógvan Joensen, í Innistovu, á Trøllanesi, 70 ár. Dagurin verður hildin í morgin leygardagin, tí koma hesar reglurnar nú.

Fyrst skal sigast, at Trøllanes er ein tann bygdin, sum eg føli meg knýttan at. Langabbi mín, langabbabeiggi Jógvan, kom av Trøllanesi, og mítt tilknýti til bygdina er fyrst og fremst takkað teimum í Innistovu, og her eigur Jógvan stóran leiklut. Vit báðir eru "bert" fermenningar, men í heiminum hjá Jógvani er hetta nærmasti skyldskapur.

Jógvan er sonur Mikkjal í Innistovu og Onnu, sum var av Húsum. Hann er giftur við Gertrud, sum er av Syðradali. Tey eiga børnini Mikkjal, Durita, Birita og Annika. Tað kann vera nevnt, at 100 ára gamla Jóhanna Mathea Skaale er fastur Jógvan.

Eg kom fyrstu ferð til Trøllanesar í 1977, júst fyri 30 árum síðani. Síðan tá er neyvan farið árið burtur ímillum, og fleiri ár havi eg verið fleiri ferðir norðuri á Nesi. Annars práta vit saman í telefon regluliga, so sigast kann at okkara samband er altíð "on line".

Tað sum verður sagt um tey í Innistovu, kann eisini sigast um hini húsini har norðuri.

Blíðskapurin í Innistovu hevur alla tíðina verið frá hjartanum. Frá fyrsta degi av havi eg kunnað følt meg sum heima hjá teimum. Tað sum liggur fremst hjá Jógvan er ættin, og tað er tiltikið hvussu nógv hann veit um ætt. Tú skal bert nevna eitt navn, so kennir hann ættina hjá teimum flestu hundraðtals ár aftur í tíðina. Vónandi verður hansara stóra vitan niðurskrivað.

Sjálvur visti eg, at vit vóru í ætt gjøgnum mammu mína, men Jógvan kundi fortelja mær, at var farið longur aftur rann ættin hjá mammu og pápa í Norðragøtu saman, so skyldskapurin gjørdist dupultur.

Kann til stuttleika nevna eitt dømi um, hvat ein slík vitan kundi og kann nýtast til. Tá eg fyri nøkrum árum síðani fekk ein verson var ikki neyðugt at gera nakra kanning av hansara "genum". Eg kendi uppá staðið hansara ætt aftur til 1650. Men hann var nú eisini systirsonur Jógvan, og hevur hetta ikki gjørt sambandið við ættina minni!

Jógvan er annars ímynd av tí besta av bygdarmentan, soleiðis sum hon t.d. kom fram í umrøðuni av fastrini, tá hon gjørdist 100 ár. Jógvan hevur verið bóndi og her hevur hann eisini kent hvønn seyð gjøgnum fleiri ættarlið. Sonurin Mikkjal hevur tikið við bóndaskapin, men Jógvan er við kortini.

Í Innistovu hava dyrnar altíð verið opnar fyri fremmandafólk, og tey eru eisini mong, sum eru komin inn á gólvið, sjálvt tá trupult var at ferðast. Sjálvur eri eg ofta komin norður á Nes við fremmandum gestum, og allir hava fingið ógloymandi upplivilsi har norðuri.

Í 2001 skipaði eg fyri norðurlendskum fakfelagsfundi í Mikladali, har tað var etið á Trøllanesi. Tá eisini var farið norður á Kallin, sum er stórsligið í góðum sýni. Tá nøkur av teimum komu aftur í 2004 høvdu tey eitt ynski, og tað var at koma norður aftur á Trøllanes, og tað komu tey eisini.

Jógvan er ein álitismaður í orðsins rætta týdningi, og hann hevur havt mong álitisstørv. M.a. hevur hann verið limur í kommunustýrinum har norðuri. Hann hevur eisini verið limur í umsjónaráðnum hjá Norðoya Sparikassa í mong ár. Eisini hevur hann verið nevndarlimur í Mjólkarvirki Búnaðarmanna.

Tað er ikki minst Jógvani fyri at takka, at Trøllanes er ein av teim mest liviligu smábygdunum í Føroyum, har fólkatalið, og ikki minst barnatalið, framvegis heldur sær á sama støði sum altíð.

Tað er ótrúliga nógv, sum kundi verið skrivað um Trøllanes, men tað er ikki rúmd fyri tí í eini slíkari føðingardagsgrein.

Her skal bert vera nýtt høvið at ynskja Jógvani tillukku við teimum 70 árunum við tøkk, eisini til Gertrud, fyri allar tær ferðirnar, eg havi sitið væl inni hjá teimum. Næsta ferðin til Nes verður heilt víst í morgin leygardagin!

ó.

## Tøkk

**Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu og beinasemi, tá kæri maður og pápi okkara**

**Símun Berthelsen**

**so bráðliga varð tikin frá okkum.**
**Takk fyri vitjanir, uppringingar, blómur, kransar og gávur til misiónshúsið.**
**Takk fyri vakur, troystandi orð í kapellinum, heima og í kirkjuni.**
**Hjartans takk fyri stóru hjálpina við jarðarferðina og ervið.**
**Takk til familju, vinir og grannar, ið hava verið so væl um okkum, og stóra takk til øll tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.**
**Ein serlig takk til manningina umborð á Strandingi.**
**Jesus veri hjá okkum øllum.**

**Elly, Pauli, Dania og Jákup**

✝

## Andlát og jarðarferðir

**Edith Klein**, Strendur, ættað úr Sørvági, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi 13. mars, 99 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjadagin 16. mars klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Nerija á Skála leygardagin 17. mars klokkan 14. Tey ið vilja minnast Edith, kunnu lata eina gávu til Eysturoyar Røktar- og Ellisheima, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Lilly Øster** fer úr kapllinum á Suðuroyar sjúkrahusi fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin klokkan 13.

## Dagurin

**17. mars Geirtrúð**, deyð 659. Dóttir Pippin eldra og abbasystir Karlamagnus. Fór ung í kleystrið Nivelles í Belgia og gjørdist eisini abbadissa har. Millum annað var hon verndari hjá ferðandi fólki, og við vegirnar nógvastaðni í Europu vórðu bygd sanktugeirtrúðtilhald, har tey ferðandi og tey fátækastu kundu fáa hjálp. Við hesi tilhald vórðu sett upp vakurt málaðar træmyndir av Sanktu Geirtrúð við gyltari krúnu. Av veðri og vindi fóru málingin og gyllingin av hesum myndum, og av tí kemur tiltakið, at "ljómin er farin av Sanktu Geirtrúð". Undir hesum býr kanska eisini tað, at teir gomlu søgdu, at var regn geirtrúðardag, fór at vera regnsummar. Navnið er týskt, samansett av orðunum spjót og styrki.

**18. mars. Aleksander**, deyður umleið 250. Úr Aleksandriu og endaði sum biskupur í Jerúsalem. Fleiri ferðir varð hann atsøktur fyri trúgv sína, men komst undan og doyði ein natúrligan deyða, og varð "blóðvitni uttan blóð", sum tikið varð til.

**19. mars. Jósef**. Dagurin hildin til minnis um festarmannin hjá Mariu Moy. Hann gjørdist, sum vera man, halgimenni hjá húsasmiðum og handverksmonnum. Bíbilska navnið merkir "Guð lati meg fjølgast".

## Tøkk



**Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæri maður mín, góði pápi, sonur, verfaðir, beiggi, versonur og svágur okkara**

**Jákup Augustinussen**
**Hoyvík**

**andaðist og varð jarðaður.**

**Takk fyri alla ta hjálp, sum veitt varð okkum í sambandi við jarðarferðina.**
**Takk fyri góð orð frá Hans Joensen, presti, í kapellinum og kirkjuni.**
**Takk til tykkum, ið stóðu fyri ervinum.**
**Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur til okkum og Krabbameinsfelagið.**
**Takk fyri góð minningarorð og til øll tykkum mongu, sum fylgdu Jákupi til hansara seinasta hvíldarstað.**

**Olavina, Rakul, Randi og Hanna**